# DASLIGT



# Tað segði bara pling

Eftir at hava lært til sjónleikara, flutti Gunnvá heimafturtil Føroyar, við tí í hyggju at steðga her í eini 2-3 á±r.

– Hygg nú, hvussu skjótt tíðin gongur. Nú havi eg longu búð í Føroyum í meiri enn fimm ár, og tað gongur á triðja ári her norðuri, sigur hon við einum brosi.

Fyrstu árini leigaði hon sær bústað í Havn, men so líðandi vann tann hugsanin fram, um at fáa sær ein meiri varandi bústað. Tað stóð henni greitt, at tað illa loysti seg at halda fram við at leiga, tí tað var nærum sum at tveita peningin út gjøgnum vindeygað.

Gunnvá byrjaði í roynd og veru at hyggja sær eftir onkrum húsi uttanfyri Havnina, millum annað í Kvívík, her hon skjótt fekk gott eyga á einum húsum. Seinni vísti tað seg, at eini onnur hús her á Víkavegi 24 kundu keypast.

– Tá eg sá hetta húsið, segði tað bara pling alt fyri eitt. Eg bleiv beinanvegin forelskað í teimum. Tey vóru bæði hugnalig og høvdu haraftrat hjall, urtagarð, rabarbugarð, kjallara og alt sum hoyrdi til eini slík hugnalig hús.

– Eg hevði sett mær eitt hægstamark fyri at kunna keypa eini hús, men tá eg so bjóðaði uppá tey, var prísurin faktiskt lægri enn tað, sigur Gunnvá sum yvirtók húsini á sumri 2008.

Hóast hetta var ivaleysa langt úr Havnini, so var tað - sum hon sjálv tekur til - styttri teinur higar, enn tað hevði verið, um hon skuldi búð í Vestmanna.

– At skula búð har, hevði nokk verið at spent elastikkið í meira lagi, um ein altso skuldi flutt sooo langt frá høvuðsstaðnum.

## Tað øvugta

Gunnvá gjørdi sær sjálvandi sína hugsan um fyrimunir og vansar við at flyta úr Havnini og norður til Kvívíkar.

Tað vóru tær røddir, sum ráddu henni frá hesum: - Altso, Gunnvá, tað mást tú forstanda: Kvívík er so langt frá Havnini; tað er so strævið at skula koyra fram og aftur á hávetri; har er eingin matvøruhandil; ein havnardama fór ikki at trívast í eini so lítlari bygd; nei, hon fór bert at støðast her í nakrar fáar mánaðir, so fór hon at gerast deyðatroytt av lívinum á bygd.

– Tja, eg veit ikki, - eg geri ofta júst tað øvugta av tí sum onnur siga, og eg hoyrdi eisini nógv fyri tað, tá eg so flutti norður. Men satt at siga, so innstillar man seg uppá tað. Soleiðis er tað bara, - eg meini so við: Hvat er tað at koyra 20 minuttir til Havnar?

– Heilt erliga, so elski eg henda koyritúrin norðuraftur um kvøldið eftir ein loknan arbeiðsdag. Fyri meg er hesin túrurin so deiliga avslappandi, greiðir Gunnvá íðin frá.

Hon leggur aftrat, at hon so líðandi eisini er vorðin eins bygdaslig og onnur. Hon tímir ikki at ganga ov leingi runt í Havnini og tvassa.

– Nei, tá eg havi verið har í eina tíð, so vil eg bara sleppa heimaftur sum skjótast.



**HEIMA**

*– Beinanvegin eg sá hesi húsini gjørdist eg forelskað í teimum. Her var alt sum hoyrdi til eini slík hugnalig hús, sigur Gunnvá, sum dámar sera væl at arbeiða í urtagarðinum*

**» Skal eg vera heilt erlig, so hevði mær dámt væl at havt ein bát, soleiðis at eg kundi farið út at fiska, til dømis seið**